M.B.M

# Nýggj telefonnummur

Frá leygardegnum 16. mars fáa vit nýggja telefonskipan, sum ger at vit verða lættari at samskifta við.

Í hesum sambandi fáa vit eisini nýggj telefonnummur.

| | |
|---|---|
| Búnaðardepilin (MBM og Royndarstøðin) | 479 000 |
| Búnaðardepilin (MBM og Royndarstøðin) telefax | 479 030 |
| MBM Fóður | 479 035 |
| MBM Fóður telefax | 479 036 |
| Ísáðing Streymoy | 479 001 |
| Ísáðing Júst Rubeksen | 219 504 |

16. mars 2002

**L/F Meginfelag Búnaðarmanna & Royndarstøðin**
FO-410 Kollafjørður


**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3331
Navn: Sp/f P. S. Petersen
Adressa: 480 Skála
Kommuna: Skála Kommuna
Stovningardato: 05.03.2002
Viðtøkudato: 05.03.2002
Kapitalur: Kr. 80.000,00
Inngjaldingarháttur: : Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100.
Stovnari: Petur S. Petersen, 480 Skáli
Stjórn: Petur S. Petersen, 480 Skáli.
Tekningarreglur: Felagið verður teknað av stjóranum.
Grannskoðari: : Sp/f Revisión, v/ Kaj Joensen, Stoffalág 4, 100 Tórshavn.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12
Fyrsta roknskaparár: 05.03.2001 - 31.12.2002
Endamál: Endamál felagsins er at reka fiskivinnu, gera íløgur, keyp/søla og eiga og reka fasta ogn.

Skráseting Føroya tann 13. mars 2002

Kristin Balle

---

Gøtu Kommuna



## Tekniskur leiðari

**til Gøtu Kommunu**

**Hervið verður søkt eftir tekniskum leiðara til kommununa, hálva tíð.**

**Høvuðsverkevni:**
- Hava dagligu leiðsluna av øllum tekniskum útbúnaði í kommununi
- Projekteringsarbeiði og eftirlit
- Uppmátingar-, kortleggingar- og skrásetingar-arbeiði
- Býar- og byggiplanlegging
- Málsviðgerð og ráðleggingararbeiði
- Stýring av kommunalum viðlíkahaldsarbeiði
- Luttøka í dagligum umsitingarligum uppgávum v.m.
- Skrivari hjá teknisku nevnd

**Førleikakrøv:**
- Verkfrøðingur, byggifrøðingur ella onnur viðkomandi útbúgving
- Royndir í omanfyri nevndu arbeiðsøkjum er ein fyrimunur
- Førleika í projekteringsarbeiði og byggilist
- Hollan telduførleika
- Opin, fyrikomandi og samstarvshugaður

Løn sambært sáttmála við avvarandi yrkisfelag.
Nærri upplýsingar starvinum viðvíkjandi fáast við at venda sær til bygdarrásskrivaran á telefon 441012.

Starvið verður at seta sum skjótast.

Bygdarráðið skilar sær rætt til frítt at velja ímillum umsøkjararnar ella ongan at taka.

Skrivlig umsókn, saman við avritum av prógvum og møguligum viðmælum, skal verða Gøtu kommunu, postrúm 40, FO-510 Gøtu, í hendi innan 25. mars 2002, kl. 18.00.


www.sosialurin.fo


**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 2198, Sp/f Grót- & Entreprenørvirki, 800 Tvøroyri.

Viðtøkur broyttar: 24.02.2002.
Nýtt navn: Sp/f TMT
Nýggj hjánøvn: Tvøroyrar Maskingrevstur & Træsmið (Sp/f TMT ) og TMT Heildarveitarar (Sp/f TMT )
Endamál: Endamál felagsins er Entreprenør- & byggivirksemi og annað virksemi í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 13. mars 2002

Kristin Balle


HESTPRENT



BØKUR, BØKUR, BØKUR
og alt annað prent

Dvørgastígur 7
100 Tórshavn
tel 314 555
fax 318 026
hestprent@hestprent.fo



BE-koyrikort
til viðfestivognar
sum t.d.:
• Hestaflutning
• Húsvognar o.a



Skeiðið byrjar við teori:
leygardagin
16. mars. kl. 10.00
(um nóg nógv tekna seg)

team85

SP/F Koyrikortið
Tórshavnar Trafikkskúli
Stoffalág 82
Tel 318821 •315298
Fartel 218777





Taljur
Stroppar
Trýst-slangur
Spuli-slangur

Tórshavnar Maskinhandil
v/ Tummas Andreasen
Varðagøta 29 - 30
100 Tórshavn - Tlf. 313442



## Brúktir skrivstovumøblar

Brúk skrivaraborð, hillar, skáp o.a. bíliga til sølu.

**P/f Meinhardt Arge**
Tlf. 345400 ella 225088



## Urtagarðsarbeiði

Vit gera alt urtagarðsarbeiði.

**Fa. Urtagarðsrøkt**
**v/ Mass Jensen, Nólsoy**
Tlf. 32 71 31 – 28 39 53



Sosialurin




## Leiðsluskrivari

Á Almannastovuni er starv sum leiðsluskrivari leyst at seta sum skjótast. Starvið er tíðaravmarkað.

Almannastovan umsitur fyriskipanir til einstaklingar eftir almannalóggávuni, herundir fíggjarligan stuðul, ráð og leiðbeining í persónligum og forsorgarligum spurningum og aðrar veitingar.

**Arbeiðið sum leiðsluskrivari umfatar, umframt skrivarauppgávur og vanligt skrivstovuhald eisini hesar uppgávur fyri stjóran:**
- telefon- og avtalustýring
- frásagnir frá leiðslu- og øðrum innan- og uttanhýsis fundum
- uppgávur innan umsiting av starvsfólki
- aðrar uppgávur innan fyrisitingina

**Vit sóknast eftir einum fólki, ið**
- kann arbeiða sjálvstøðugt
- er røkin og hevur sans fyri samskipan
- hevur hug at samskifta við nógv fólk
- dugir at orða seg á føroyskum og donskum
- hevur kunnleika til EDV- og journalarbeiði í ávísan mun

Hevur tú hóskandi útbúgving og helst royndir innan almenna umsiting, ert tú vælkomin at søkja.

Vit kunnu bjóða eitt spennandi, áhugavert og sjálvstøðugt arbeiði við sera fjølbroyttum uppgávum.

**Lønar- og setanarviðurskifti**
Setanar- og lønarviðurskifti eru sambært sáttmálan millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Petru J. Joensen, almannastjóra, á tlf. 31 54 80.

Umsóknir við avriti av prógvum o.ø. skulu sendast til:

**Almannastovuna**
Postsmoga 3096,
110 Tórshavn

Umsóknarfreist: 29. mars 2002 kl. 12.00.
Vinarliga merkið brævbjálvan: »Leiðsluskrivari«


Felagið
Tórshøll
Hetta vikuskiftið spæla



Hvørt fríggjakvøld, leygarkvøld og sunnukvøld er
livandi tónleikur

Bingo leygarkvøldið kl. 20.00
Sunnudagin sjavskapping kl. 15.00

Felagið Tórshøll
Sverrisgøta 22
Tlf. 31 15 65


Almanna- og Heilsumálastýrið

## Skrivari til trivnaðar- og heilsuráðið

Trivnaðar- og heilsuráðið er ráð undir landsstýrismanninum í almanna- og heilsumálum, og hevur til uppgávu at útgreina føroyska almanna- og heilsuverkið og gera uppskot til eina langtíðarætlan fyri føroysku vælferðartænastuna.

Av tí at skrivari ráðsins fer í annað starv, verður við hesum søkt eftir nýggjum skrivara at starvast fulla tíð. Starvið er tíðaravmarkað til 31. desember 2002. Tað er Trivnaðar- og heilsuráðið, sum er arbeiðsgevari hjá skrivaranum, ið dagliga heldur til í Almanna- og heilsumálastýrinum.

**Arbeiðsøkið:**
Skrivarin skal í samstarvi við Trivnaðar- og heilsuráðið gera av, hvussu arbeiðið verður lagt til rættis.

Arbeiðið fevnir m.a. um:
- at fáa til vega upplýsingar um almanna- og heilsuøkið í Føroyum og í øðrum londum
- at leita upp viðkomandi áhugabólkar
- at veita ráð og vegleiðing
- at gera útgreinandi arbeiði

**Krøv til umsøkjaran:**
- viðkomandi útbúgving frá hægri lærustovni
- royndir, hug og evni til arbeiði við tíðaravmarkaðari arbeiðsuppgávu.
- kunnleika til Almanna- og heilsuøkið
- royndir við EDV.
- góð evni at orða seg í skrift og talu
- góð samstarvsevni.

**Lønar- og setanartreytir:**
Starvið verður sett sambært avtalu ímillum Fíggjarmálastýrið og avvarðandi yrkisfelag.
Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Aibritt á Plógv, aðalstjóra, tlf. 30 40 50, ella Kristionnu Winther Poulsen, tlf. 30 40 54.

**Umsókn:**
Umsókn við avriti av prógvum/viðmælum skal sendast til:

**Almanna- og heilsumálastýrið**
Starvsfólkadeildin
Eirargarður 2
100 Tórshavn

**Umsóknarfreist: 2. apríl 2002, kl. 12.00**

Atlantic Petroleum

## Ársaðalfundur

**í P/F Atlantic Petroleum**

Sum áður lýst verður ársaðalfundur felagsins í læraraskúlahøllini í Havn fríggjadagin tann 15. mars 2002 kl. 17.00.

**Nevndin**


www.sosialurin.fo